# Nýggj lond skulu upp í part

Á Norðurlandaráðsfundi í Stockholm í vikuni mælti Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, til, at norðurlendska samstarvið verður víðkað til eisini at umfata Hetland, Orkney, Hebridurnar, Isle of Man og ávís øki á eysturstrondini í Kanada.

– Norðurlond kunnu bara fáa nakað gott burtur úr at víðka tað mentanarliga samstarvið við hesi øki, segði Jógvan á Lakjuni í sínari røðu.

Hann heldur, at tað skal verða uppgávan hjá Norðurlandahúsunum í útnorði at menna hetta samstarv, men hann legði dent á, at eisini politisku myndugleikarnir mugu virka fyri at víðka samstarvið til eisini at umfata grannarnar hjá útnorðurlondunum.

**ek**

# Virðislønir vórðu handaðar

Týsdagin vórðu virðslønir frá Norðurlendska ráðnum handaðar fyri bókmentir, tónleik og umhvørvið. Virðislønirnar vóru áljóðandi 350.000 kr. hvør.

Virðislønina fyri bókmentir vann finski høvundurin kari Hotakainen. Í takkar røðu síni segði hann m.a. at hann upprunaliga hevði ætlað at skriva um hus, men skrivaði tá avtornaði um einsemi. Tónleikavirðislønina fekk íslendingurin Haukur Tómason, syri tónleikin til operaina 4. Songur Guðrunnar. Virðislønina fyri at gera eitt gott og týdningarmikið arbeiðið fyri umhvørvið fekk felagið Coalition Clean Baltic, ið arbeiðir fyri einu reinum Eystursjógvi.

**Eys**


# Tryggleiki og lívsvirði - til allar borgarar!



*Vilt tú:*

- At frælsa ítróttin verður raðfest og fær virðiligar umstøður at virka undir
- At børnini skulu ferðast trygt til og frá skúla
- At børnini skula hava eina virðiliga frítíðarskúlaskipan
- At skúlin og ansingarpláss stuðla undir og ganga undan, tá ið tað ræður um heilsugóðan kost og rørslu
- At foreldur fáa rímiligar fíggjarligar fyritreytir at ansa børnunum úti ella heima
- At vit fáa betri umstøður til frítíðar virksemi - m.a. tónleik, ítrótt og grøn øki
- At kommunan stuðlar undir og gongur undan, tá ið tað ræður um ein sunnan og góðan lívsstíl
- At kommunan raðfestir allar borgarar - nýføðingar, børn, tannáringar, vaksin, foreldur og gomul - eins og bjóðar teimum virðiligar umstøður og loysnir
- At kommunan virkar fyri talgilding av tænastum og í samstarvi við vinnuna gongur undan í nýtslu av kunningartøkni
- At vinnan verður stimbrað og fær nøktandi karmar at virka undir

***Við tínum stuðli og atkvøðu fer hetta at vera míni fremstu mál at fremja í Tórshavnar kommunu.***

Tin stuðul - mín avbjóðing!

**Robert Vilhelmsen, valevni á lista C**


# Ólógligt at drekka í gøtunum

RÚSDREKKABANN

*ÁkiBertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nógvir føroyingar ferðast hvørt einasta ár til Hetlands at halda feriu. Ikki minst í summar kann væntast ein rættilig innrás av føroyingum í grannalandinum fyri sunnan, tí nú verða oyggjaleikirnir hildnir í Hetlandi og tað dregur nogv fólk til sín.

Vónandi fer tað ikki at taka glansin av stuttleikanum, at hetlendingar júst hava sett forboð ímóti at drekka á á gøtunum og á øðrum almennum støðum í høvuðsstaðnum, Lerwick.

Kortini verður lagt afturat, at í serligum føri verður forboðið tikið av, eitt nú tá ið serligar býarveitslur eru.

Tað er løgreglan í Lerwick sum í longri tíð hevur strongt á myndugleikarnar fyri at fáa teir at seta forboð fyri at drekka á almennum støðum. Løgreglan vil koma ófantaligum atburði á almennum støðum til lívs og hon gevur rúsdrekka ein stóran part av skyldini fyri, at tann ljóta atburðin hjá summum.

Sostatt er løgreglan sum vera mann, fegin um forboðið og politimeistarin í Lerwick sigur við Shetland Times, at hetta verður eitt hent amboð í royndunum at koma ófriði í miðbýnum í Lerwick til lívs.

– Eg ivist ikki í, at forboðið fer at gera Lerwick til tryggari, sigur hann.

Við hesum sigur hann als ikki, at tað er ótrygt at ganga í gøtunum í Lerwick sum er, tí tað er nógv tryggari enn aðrastaðni í Bretlandi.

Samstundis er talið á politistum í Lerwick eisini økt nokk so fitt seinastu tíðina. Tað hava verið 33 politisar í Lerwick, men nú eru teir 40. Harafturat hava teir 13 eykapolitistar.

Ikki øll eru so fegin um forboðið. Onkur býráðslimur sigur, at hetta ger vanligar borgarar til lógbrótarar.

– Flotar tú ein bát, kanst tú ikki bjóða hjálparfólkunum eina øl aftaná uttan at bróta lógina. Og grillar tú á strondini eitt summarkvøld og hevur eitt glas av víni afturvið, ert tú eisini lógbrótari, sigur býráðslimurin, Gussie Angus.

Ein annar býráðslimur, Jim Henry, stúrir eisini fyri, at hetta fer bara at flyta trupulleikarnar út um Lerwick.

# Leivur gjørdi myndina eftir áheitan



*– Soleiðis hugsar Leivur Nygaard sær, at eittrøktarheim vesturi á Vatninum í Vági, kann síggja út. Tað er ein bólkur av vágbingum, sum hevur biðið hann gera myndina*

Í Sosialinum í gjár høvdu vit drúgva grein um ætlanina hjá landsstýrium at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági til Hovs og at leggja hann í ein skúladepil har. Afturfyri skal røktarheim byggjast á stykkinum í Vági, sum er grivið út til miðnámsskúla.

Í tí sambandinum vístu vit eina mynd, sum Leivur Nygaard á Tvøroyri hevur gjørt, har hann vísur, hvussu eitt røktarheim kann fara at síggja út á stykkinum, sum er grivið út til miðnámsskúlan.

Fyri at ongar misskiljingar skulu vera, er tað rættast at skoyta uppí, at Leivur Nygaard hevur gjørt myndina eftir áheitan frá viðskiftafólkum. Tað er sostatt ein bólkur av vágbingum, sum hevur biðið hann gera myndina

**–áki–**


Made by you

Fríggjadagin 5.november kl. 13-18 og leygardagin 6. november kl. 10-17 vitjar ein serfrøðingur frá Montana Idé Møblar á Hálsi. Kom og fá góð ráð og vegleiðing um innrætting við Montana.






Levering innan jóla skal bíleggjast innan 6. november kl. 17

Montana er ein skipan, ein fræls skipan, sum tú frítt kanst dusa tær innanfyri.
Útgangsstøðið er einfalt, men rúmar óendaligar møguleikar.
Lat hugflogið reika við sniði, litum og virkni.
Dyrka frælsið og tak fólk á bóli við sansaligum skapanarhugi og opnum sinni fyri nýggjum møguleikum.
Og vís hvør tú ert gjøgnum títt rúm.
Tí bara tú merkir, nær tú stendur í tínum rúmi.

IDEmøblar
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80

Montana





# Kvinnukvøld

á Hotel Føroyum



Forkela teg sjálva!
Lekkurt kvinnukvøld verður á Hotel Føroyum
**leygarkvøldið 13. november**
tí nýtt damublað kemur út.

Dyrnar verða stongdar kl. 19.30 stundisliga!

**20:00 - Fyrsti partur**
Vælkomin, Lena L. Mohr, *blaðstjóri á Kvinnu*
Hugleiðing, Elin Winther Poulsen, *journalistur í ÚF*
Mótasýning
Sjónleikur, *Birita Mohr og Súsanna Tórgarð framføra stuttan sjónleik*
Mótasýning
3 dansarar frá Ljósinum

**21:00 - Steðgur**
Pinnamatur og eitt glas av víni / djúsi
Stundir til hugnaligt prát

**22:00 - Annar partur**
Hugleiðing, Bjørt Samuelsen, *journalistur á Kvinnu*
Mótasýning
Lena & Niclas spæla og syngja
Mótasýning
Takk fyri, Lena endar

**23:00 - Liðugt**

***Allar fáa eitt eintak av blaðnum Kvinnu***

Prísur: kr. 300,-

Avmarkað atgongd - so skunda tær!

KEYP ATGONGUMERKI Á
**WWW.KVINNA.FO**



www.sansir.fo

kvinna



BJARTI MOHR
Tórshavn, fyrst og fremst
- ein góð kommuna fyri øll

XA
FÓLKAFLOKKURIN

# Nýggir ráspakkar við DR1 og DR2

Keyp
**Televarpsmóttakara**
Force D-master 1144T



*fyri einans 995,-*
*og síggj Televarpið ókeypis til 1. des. 2004*
*Treytað av 12 mánaða Televarpshaldi*




CHAMPIONS LEAGUE á TV3+ og VIASAT SPORT



PROFILEN Á DR



ROBINSON á TV3

Tel 340340
www.televarp.fo

**ÆLABOGIN**

Mánaðargjald fyri Ælabogan, við 23 rásum **299,-**
* Hesar rásir skiftast um at senda (Timeshare)

**BLÁI**

Mánaðargjald fyri bláa pakkan, við 20 rásum **199,-**
* Hesar rásir skiftast um at senda (Timeshare)

Canal+ pakkin er ein ískoytispakki

CANAL+ · CANAL+ SPORT · CANAL+ FILM 1 · CANAL+ FILM 2

Mánaðargjald fyri Canal+ pakkan, við 4 rásum **219,-**

**GULI**

Mánaðargjald fyri gula pakkan, við 12 rásum **169,-**

**REYÐI**

Mánaðargjald fyri reyða pakkan, við 13 rásum **249,-**
* Hesar rásir skiftast um at senda (Timeshare)

**Prísir galdandi frá 1. des. 2004**

**Kortleigugjald:**
Haldarakort kostar kr. 150,- um hálvárið.
Gjaldið verður kravt fyrstu ferð, goldið verður fyri ráspakkan, og síðan 6. hvønn mánað.